

zarepta

## Familjulega fyri brekað

# Visjón
### -Nútíð og Framtíð

Hjartaliga vælkomin á familjulegu í Zarepta í døgunum 11.-14. mai.
Legan er ætlað øllum, ið bera brek og familjum teirra.

Á leguni, sum verður myndað eftir luttakraynski, er millum annað:

Fyrilestur, pallborð, samtalubólkar, andakt, kvøldsøga, sangur, tónleikur, leikvenjing, fimleikur, ríðing, svimjing, túrar, spæl úti og inni, ymisk ítriv og video.

**Fyrilestrarnir verða hesir:**

| | | |
|---|---|---|
| 12 mai | kl. 10.00 | Lívsroyndir og ynskir, Malena Arnoldsdóttir |
| | kl. 15.30 | Pedagogisk visjón, Jarvin F. Hansen |
| | kl. 20.00 | Down's Syndrom og Karlstad modellið, Jóhanna og Bogi Andreasen |
| 13. mai | kl. 14.00 | Brekað, menning og skúlaverkið, Lea og Óli Wolles |
| | kr. 20.30 | Fyribyrging og heilsa, Heðin Thomsen |

Havi hetta við:
1 Dýnuvár, koddavár og lak
1 Um tú verður við á túrinum og til svimjing: heit klæði, gonguskógvar, regnklæði, gummistivlar og svimjiklæði

Kostnaður fyri leguna:

| | |
|---|---|
| Vaksin | kr. 300 |
| Børn 6-14 ár | kr. 150 |
| Børn 0-5 ár | ókeypis |

Konto í peningastovnunum

Húsið er opið kl. 18.00 hóskvøldið.
Náttur ði verður boðin frá kl. 19.30.
Legan verður sett kl. 21.00

Ringið til ein av undirritaðu, um spurningar eru í sambandið við leguna.

Annika Gaard, Tlf. 314281 — Samly Reinert, Tlf. 318720
Jógvan Gaard, Tlf. 456822 — Diana Í Puntabyrgi, Tlf 316510
Anna á D. Mørkøre, Tlf. 315280 — Elisabeth Mortensen, Tlf. 317244

NB! Tilmelding í seinasta lagi leygardagin 6. mai hjá Anniku Gaard, tlf. 314281 ella teldupost: kgaard@post.olivant.fo

Vinarliga



zarepta

Tlf. 332140

**Skipaeftirlitið**
FAROESE MARITIME AUTHORITY
*MINISTRY OF FISHERY AND MARITIME AFFAIRS*

# Tvey skipaeftirlitsfólk

Skipaeftirlitið søkir eftir tveimum skipaeftirlitsfólkum, einum verkfrøðingi og einum skipsførara.

Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum, men virkar dagliga sum sjálvstøðugur stovnur, við skrivstovu í Miðvági. Skipaeftirlitið arbeiðir saman við klassafeløgunum og øðrum undirveitarum um eftirlit við skipum og bátum. Tætt samskifti er við vinnuna í hesum sambandi.

Størvini sum skipaeftirlitsfólk umfata í høvuðsheitum arbeiðið á skrivstovuni í Miðvági og nakað av arbeiðið uttanfyri skrivstovuna.

**VERKFRØÐINGURIN**
**Starvið hjá verkfrøðinginum inniber í høvuðsheitum hesar upppgávur:**
- góðkenning av tekningum í sambandi við ný- og umbyggingar
- onnur málsviðgerð og uppfylging
- eftirlit við skipum og bátum
- eftirlit við góðkendum glasfipurverkstøðum
- uppbygging av skipanum
- luttøka í tvørgangandi uppgávum á Skipaeftirlitinum, undir hesum verkætlanum

**Førleikakrøv**
til starvið krevst útbúgving:
- sum skipsverkfrøðingur
- ella sivilverkfrøðingur
- ella annar verkfrøðingur, sum er serkønur innan sjóvinnu
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki og verður kravt, at viðkomandi luttekur í eftirútbúgvingum har tað er neyðugt fyri at røkja dagligu uppgávunar.

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya verkfrøðingafelag.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**SKIPSFØRARIN**
Starvið hjá skipsføraranum inniber í høvuðsheitum hesar upppgávur:
- eftirlit við skipum, bátum og trygdarskipanum
- viðlíkahald av formularum til skipsskjøl
- uppbygging av viðlíkahalds- og trygdarskipanum til fiskifør
- luttøka í tvørgangandi uppgávum á Skipaeftirlitinum, undir hesum verkætlanum

**Førleikakrøv**:
- til starvið krevst útbúgving sum skipsførari við sjóvinnubrævi sum skipsførari, STCW II/2
- teldubrúkari við góðum kunnleika til MS-office forritini
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli

Kravt verður eisini, at umsøkjari hevur fimm ára royndir sum skipsyvirmaður

Fyrimunur er, um umsøkjari hevur kunnleika til góðskustýring (kvalitetsstýring) ISO 9000, ISM og ISPS.

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki og verður kravt, at viðkomandi luttekur í eftirútbúgvingum har tað er neyðugt fyri at røkja dagligu uppgávunar.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt í 8. flokki í sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið, haraftrat verða veittar 3000,- kr. í viðbót um mánaðin fyri álagt úrtíðararbeiði í upp til 35 tímar um ársfjórðingin.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2006, kl. 14.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið,**
Postsmoga 26, 370 Miðvágur

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.


**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar



ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

# Nýggjar
# TANNPROTESUR
**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**
Kliniskur tannteknikari
## Bergur á Reynatrøð
Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12
Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480